


*Bæði mikudagin og væntandi eisini í gjár fekk Delta Seafood á Tvøroyri fisk suður við Reginu Baltica. – Tað hevði sjálvandi verið betri, um farleiðin var tryggari, sigur Magnus Jespersen, stjóri*

# Regina Baltica hevur ikki elvt til høvuðbrýggj

**SUÐUROYARLEIÐIN** Magnus Jespersen, stjóri á Delta Seafood á Tvøroyri, sigur, at tey hava ikki havt teir heilt stóru trupulleikarnar, nú siglingin hjá Reginu Baltica hevur verið óreglulig. – Men sjálvandi er tað keðiligt, um fiskur kemur at standa, sigur hann

Vilmund Jacobsen

Hóast óreglusemi hevur verið á farleiðini um Suðuroyarfjørð, síðan Smyril fór í dokk, og avloysarin Regina Baltica ikki hevur megnað at hildið ferðaætlanina, hevur hetta kortini ikki elvt til teir stóru vinnuligu trupulleikarnar hjá framleiðsluvirkjum í Suðuroy.

Magnus Jespersen, stjóri á Delta Seafood á Tvøroyri, sigur, at virkini í oynni í størstan mun keypa ráfiskin frá skipum og bátum, sum landa í Suðuroy, og tí hevur óreglusemi, sum verið hevur, higartil ikki havt so stóra ávirkan á virksemi.

– Sjálvandi hevði tað verið best og tryggast, um veður og vindur ikki ávirkaði farleiðina so skjótt, tí tað vildi verið óheppið, um fiskur kom at standa, sum ikki fekst um fjørðin, sigur hann.

## Hava keypt

Stjórin vísir á, at nakað av fiski verður keypt á uppboðssølu, sum síðan kemur suður í trailarum.

– Vit keyptu soleiðis fisk mikudagin og fingu hann suður við Reginu Baltica, og vit keyptu eisini fisk í gjár, sum vit skuldu fáa suður í gjárkvøldið, sigur hann.

Magnus Jespersen ásannar, at sjálvandi kann tað koma at fáa sína ávirkan, um hann øtlar veðrið aftur, soleiðis at eingin sigling verður um Suðuroyarfjørð, tá brúk annars er fyri, at túrarnir verða sigldir.

*vilmund@sosialurin.fo*

**... virkini keypa mesta ráfiskin frá skipum og bátum, sum landa í Suðuroy...**

MAGNUS JESPERSEN

# Smáliga up út yvir San

**FISKAFRAMLEIÐSLA** Í seinastuni hevur lítið virksemi verið á flakavirkinum hjá Sandoy Seafood í Skopun. Nú Eysturbúgvin, sum er álitið í oynni, aftur er farin á upsaveiði, er væntandi, at meiri virksemi verður í Skopun. Í Hvalba sær hinvegin betri út



Vilmund Jacobsen

Upsaveiðan hjá partrolarunum hevur verið heldur sløk í ár, og serliga hevur veiðan roynst illa í summar. Hetta hevur gingið útyvir virksemi hjá virkjunum sum arbeiða upsa.

Nú heystið stendur fyri, verður vóna, at meiri upsi verður at fáa, og onkrar ábendingar eru um, at soleiðis verður.

Í gjár vóru partrolararnir Jaspis og Ametyst í Saltangará við fullari last av góðum upsa, og mikudagin landaðu eisini partrolararnir Hamranes og Breiðanes góða upsalast í Hvalba.

Tá upsin hevur verið álitið hjá fleiri fiskavirkjum seinnu árini, nú lítið hevur verið at fingið av toski og hýsu, hevur tað eisini gingið útyvir útboðið av fiski, at eisini henda veiðan hevur verið í lakara lagi.

## Lítið virksemi

Magnus Jespersen, stjóri á Delta Seafood á Tvøroyri, sum eisini er stjóri á Sandoy Seafood, sigur, at lítið virksemi hevur verið á flakavirkinum í Skopun í seinastuni.

– Nú Eysturbúgvin, sum er álitið í oynni, er liðugur á gulllaksi og aftur er farin á upsaveiði, vænta vit, at tað verður heldur frægari við ráfiski og arbeiði í Skopun. Eysturbúgvin leggur at kalla hvørja upsalast upp í Sandoynni, sigur hann.

Stjórin vísir á, at tað kortini ikki er soleiðis, at teir, sum eiga Eysturbúgvan, lata

### Jóhan Dahl, landsstýrismaður:

# Steðgaði ætlan

**KYNBÓTAARBEIÐI** – Tá vit hava eina vælvirkandi alivinnu í Føroyum, sum hevur stóran samfelagsligan týdning, helt eg tað ikki vera rætt at gevast við lívfiskaarbeiðnum í Føroyum, sigur Jóhan Dahl, landsstýrismaður, sum fegnast um, at samarbeiðsavtala nú er fingin í lag millum Fiskaling og SamloBreed í Noregi

Vilmund Jacobsen

Leingi hevur ætlanin verið at gevast við kynbótaarbeiði á Lívfiskastøðini í Skopun og avgerðin um, at hetta arbeiði skuldi halda uppat, er fyri so vítt tikin fyri fleiri árum síðan.

Men Jóhan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, hevur havt eina aðra áskoðan um hesi viðurskifti og hevur hildið, at tá ið vit hava eina vælvirkandi alivinnu í Føroyum, sum hevur stóran samfelagsligan týdning, er tað ikki rætt at gevast við lívfiskaarbeiðnum í Føroyum.

## Steðgaði ætlanini

Við Sosialin sigur landsstýrismaðurin, at hann regulert steðgaði ætlanunum um niðurlegging.

– Eg fekk ein dialog í lag